MÁLRÁÐIÐ
øll eiga málið

Løgtingið
johnhardk@logting.fo

4. mai 2023

Til Bjørt Samuelsen, løgtingsformann

Løgtingsformaðurin vendi sær til Málráðið í skrivi dagf. 1. februar 2023 við fyrispurningi um starvsheiti Løgtingsins. 23. februar sendi Málráðið Løgtingsformanninum eitt svar, men vil hervið leggja hetta aftur at tilmælinum: Umframt at Málráðið mælir til, at Løgtingið loyvir starvsheitum við *-kvinna* og *-fólk*, soleiðis sum upprunaliga tilmælið tilskilar, mælir Málráðið til, at Løgtingið framvegis loyvir heitunum við *-maður* við kynsneutralari merking, tí at hetta av mongum verður fatað sum óheft at lívkyni. Fleiri eru, sum framvegis vilja nevnast *-maður*, hóast tær eru kvinnur, og fleiri eru, sum vilja halda fram at nýta siðsøguliga heitið *-maður*, hóast sipað verður til kvinnur. Á henda hátt kann Løgtingið rúma nútíðarføroyskum kynsneutraliteti og málsligum mentanararvi.